LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 30. juni 2023
J.Nr.: LUM-16- 23/12333-21
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit
um
at Uttanríkis- og vinnumálaráðið noktar at lata innlit í alla frágreiðingina um viðurskiftini við Russland

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um handfaringina hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum av eini umsókn um innlit í frágreiðingina um viðurskiftini við Russland. Umboðsmaðurin helt, at tá partvíst innlit var latið, hevði ráðið sýtt innlit í ov nógv brot í frágreiðingini, og at innlitið var ikki givið á nóg greiðan hátt. Umboðsmaðurin heitti tí á Uttanríkis- og vinnumálaráðið um at taka málið upp til nýggja viðgerð.*

## 2. Málslýsing

Við skrivi, dagfest 7. juli 2023 hevur A, journalistur í Kringvarpi Føroya, sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> "Eg vil hervið kæra avgerðina hjá miðfyrisitingini / Uttanríkis- & Vinnumálaráðnum um at nokta innlit í **alla** frágreiðingina um sambandið við Russland, sum landsstýrið hevur víst til í almenna orðaskiftinum - enntá á tíðindafundi á Viðareiði 1. juni 2023.
>
> Sí upprunaligu innlitsumbønina niðast í hesum teldupost-tráði (teldupostur frá undirritaða 3. juni 2023), har biðið verður um innlit **í trimum stigum** (vanligt innlit, meirinnlit og partvís innlit við útstrikan av viðkvomum upplýsingum/metinginum). Og sí svarið frá UVMR í gjár (... 7. juni), har **alt innlit verður noktað**.
>
> Til setningin í svari hennara, har hon skrivar, at "vit venda kortini aftur viðvíkjandi telefonsamrøðuni í gjár um umrøddu tølini" skal eg viðmerkja, at hon her sipar til samrøðu við B (journalist í KvF), sum eisini hevur áhuga í faktuellu tølunum í frágreiðingini hjá landsstýrinum. Svarið, "kortini venda aftur..." kann ikki rættvísgera noktandi innlit í faktuell tøl í eini frágreiðing.

Av tí at málið er sera aktuelt, fari eg at heita á Umboðsmannin um at viðgera hesa kæruna sum skundmál.

Í eini roynd at skunda undir málið seti eg tann kærda, tvs. UVMR, á cc til hesa kæruna. "

Innlitsumbønin, sum Kringvarpið sendi Løgmansskrivstovuni tann 3. juni 2023, var soljóðandi:

"Vísandi til innlitslógina verður biðið um innlit í fylgjandi:

Greiningararbeiðið hjá landsstýrinum um samband & samstarv við Russland (sum løgmaður og landsstýrisfólk hava víst til, síðani í vetur, og sum nú er liðugt). Í samband við ráðførslu í Uttanlandsnevndini 26.mai varð víst á, at landsstýrið tá kom í nevndina við "eini frágreiðing og einum tilmæli". Tað er henda frágreiðing, ið innlit verður biðið um. Av givnum orsøkum veit eg ikki heiti á hesi frágreiðing, men við hesum kann eingin ivi verða um, hvat talan er um.

Í fyrstu atløgu verður biðið um innlit í alla frágreiðingina (tvs úrslitið av greiningararbeiðnum)

Verður umbønin um innlit av einhvørjari orsøk ikki gingin á møti, so vil eg við hesum - tvs beinanvegin - biðja um meirinnlit. Tvs heita á landsstýrið um at brúka ta heimild í innlitslógini, sum gevur myndugleikanum møguleika at geva meirinnlit, tá almenni áhugin talar fyri tí.

Í triðja lagi, um tað av einhvørjari orsøk heldur ikki verður gingið á møti, vil eg við hesum - tvs beinanvegin - biðja um at fáa frágreiðingina útflýggjaða við teimum útstrikingum, ið myndugleikin metir vera neyðugar. Tvs at eg fái tilfarið, og tit strika út tað, sum tit meta vera neyðug.

Av tí at málið er sera aktuelt og viðkomandi fyri samfelagskjakið, fari eg at heita á tykkum at avgreiða hesa innlitsumbøn skjótt.

Innlitsumbønin verður send Løgmansskrivstovuni, sum at síggja til í almenna rúminum hevur staðið fyri hesum greiningararbeiði (sum tó møguliga er gjørt aðrastaðni í miðfyrisitingini). Um Løgmansskrivstovan av einhvørjari orsøk ikki er rætti móttakari av hesi innlitsumbøn - lat meg so frætta beinanvegin, hvar innlitsumbønin so skal sendast."

Sama dag svaraði Løgmansskrivstovan:

"Takk fyri tína umbøn. Av tí at tað eru Uttanrikis- og vinnumálaráðið og Fiskimálaráðið, sum hava framleitt frágreiðingina, er tað tey, ið eiga at taka støðu til tína umbøn.
Eg havi sett Herálvur og Elin cc til hendan teldupostin. Tú frættir frá teimum."

Tann 7. juni 2023 sendi Uttanríkis- og vinnumálaráðið Kringvarpinum soljóðandi avgerð:

“Takk fyri umbøn tykkara um innlit í 1) ”Greiningararbeiðið hjá landsstýrinum um samband & samstarv við Russland”, 2) meirinnlit í sama skjal ella 3) skjalið útflýggjað við neyðugum útstrikingum.

Sambært § 13, stk. 1, nr. 2 í innlitslógini kann rætturin til skjalainnlit ”avmarkast í tann mun tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni viðvíkjandi […] uttanríkispolitiskum ella uttanríkisfíggjarligum áhugamálum, herundir viðurskiftini við aðrar tjóðir ella millumtjóða stovnar”. Skjølini, sum umbønin viðvíkur eru fyrireikandi tilfar, herupiií ráðførsluskriv, sum er latið Løgtingsins Uttanlandsnevnd í trúnaði. Úflýggjan av skjalinum verður mett at kunna elva til skaða fyri uttanríkispolitisku áhugamál Føroya, heruppií samráðingarstøðu Føroya og viðurskiftini við onnur lond. Tí verður innlit ikki latið í skjalið.

Harumframt verður mett, at tað er neyðugt at afturhalda upplýsingunum, við atliti til politisku avgerðartilgongdina, nú málið framvegis verður viðgjørt í Løgtingsins Uttanlandsnevnd, sum hevur fingið tilfarið í trúnaði, sbr. § 13, stk. 1, nr. 6.

Av somu orsøk verður ikki mett, at skjølini eiga at verða útflýggjað partvís, áðrenn slík avgerð fyriliggur, sbr. sambært § 13, stk. 2 í innlitslógini, sum ásetur, at um ”um umstøður, sum nevndar í stk. 1 bert gera seg galdandi fyri ein part av einum skjali, skal viðkomandi gerast kunnigur við restina av innihaldinum í skjalinum.” Vit venda kortini aftur viðvíkjandi telefonsamrøðuni í gjár um umrøddu tølini.

Viðvíkjandi umbønini um meirinnlit metir Uttanríkis- og vinnumálaráðið, at tær upplýsingar, sum eftir okkara meting kunnu verða undantiknar frá innliti, ikki eiga at verða útflýggjaðar eftir regluni um meirinnlit í § 4, stk. 1, 2. pkt. í innlitslógini. Í viðgerðini verður mett um atlitini, sum øðrumegin liggja til grund fyri § 13, stk. 1, nr. 2 og 6 og hinumegin áhuganum, sum umsøkjarin hevur í, at umbønin um innlit verður gingin á møti.”

## 3. Viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Tann 7. juni 2023 varð klagan send Uttanríkis- og vinnumálaráðnum til viðmerkingar. Ráðið varð samstundis biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum, umframt skjalayvirlitið, skjótast gjørligt og í síðsta lagi innan 1 viku. Eftir áheitan frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum varð freistin seinni longd til 16. juni.

Tann 16. juni 2023 sendi Uttanríkis- og vinnumálaráðið umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

“...

Eftir russisku innrásina í Ukraina, hava Føroyar sett avmarkandi tiltøk í verk, við støði í tiltøkum, sum ES, Noreg og onnur lond hava sett í gildi, sum aftursvar móti atgerðunum hjá Russlandi. Í sambandi við at flestu lond í Evropa royna at minka um samstarvið við Russland,

hevur spurningurin um framhaldandi samstarv á fiskiveiðuøkinum og ásetingar í avmarkandi tiltøkunum um havnastongsul verið nógv umrøddur.

Sum fyrireiking til og grundarlag undir viðgerð og støðutakan hjá landsstýrinum, setti landsstýrið fyrr í ár eitt formligt greiningararbeiði í gongd í Fiskimálaráðnum og Uttanríkis- og vinnumálaráðnum. Talan er um eina samanrenning av metingum og upplýsingum á uttanríkis- og fiskiveiðuøkinum, sum hava stóran týdning fyri viðurskifti Føroya við onnur lond, herundir møguligu samráðingarstøðu Føroya á fiskiveiðuøkinum. Sostatt er talan um skjal, sum snýr seg um viðurskiftini við onnur lond, umframt innanhýsis føroyskar fyrireikingar til møguligar samráðingar við onnur lond. Samanumtikið viðger frágreiðingin týðandi uttanríkispolitisk og- búskaparlig atlit hjá Føroyum í fleiri samanhangum.

Útflýggjan av skjalinum í síni heild verður tískil mett at kunna elva til týðandi skaða fyri uttanríkispolitisku áhugamál Føroya, heruppií samráðingarstøðu Føroya og viðurskiftini við onnur lond. Hóast ávísar upplýsingar í tilfarinum ikki einsamallar elva til skaða fyri áhugamál Føroya, metir Uttanríkis- og vinnumálaráðið, at tað í fleiri førum kortini er týðandi vandi fyri slíkum skaða, um upplýsingarnar verða tiknar úr tí samanhangi, tær eru brúktar. Í hesum sambandi verður víst á, at frávik kunnu gerast frá § 13, stk. 2, um lutvíst innlit avdúkar tey viðurskifti, sum tað er heimild at halda loyniligt. Eisini verður dentur lagdur á, at tað ikki er skylda at veita innlit í skjøl, har innihaldið ikki longur gevur meining ella hongur saman, um lutvíst innlit verður latið, sbr. Offentlighedskommissionens betænkning nr. 1510 (2009), s. 699.

Síðani Uttanríkis- og vinnumálaráðið fyri einari viku síðani noktaði at veita innlit í skjalið, hevur nógv umrøða verið av skjalinum og pørtum av innihaldinum, eins og politiska viðgerðin av málinum er komin longur. Í tí sambandi hava bæði landsstýrismaðurin í uttanríkismálum og løgmaður lutvíst umrøtt veruligu umstøðurnar í skjalinum.
Tí verður nú mett, at tað ber til at lata lutvíst innlit í skjalið sambært § 13, stk. 2, uttan at lutvís útflýggjan av upplýsingum í skjalinum væntast at elva til týðandi skaða fyri uttanríkispolitisku- og búskaparligu áhugamál Føroya, sbr. § 13, stk. 1, nr. 2.

Avrit av nýggju viðgerðini av innlitsumbønini verður sent Løgtingsins Umboðsmanni til kunnleika.

...”

Nýggja skrivið frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum til Kringvarpið, dagfest 16. juni 2023, var soljóðandi:

“Víst verður til umbøn tykkara um innlit tann 3. juni og klagu um noktandi innlit frá 7. juni 2023 í “Greiningararbeiðið hjá landsstýrinum um samband & samstarv við Russland”.

Sum fyrireiking til og grundarlag undir viðgerð og støðutakan hjá landsstýrinum um viðurskiftini við Russland, setti landsstýrið fyrr í ár eitt formligt greiningararbeiði í gongd í Fiskimálaráðnum og Uttanríkis- og vinnumálaráðnum. Talan er um eina samanrenning av metingum og upplýsingum á uttanríkis- og fiskiveiðuøkinum, sum hava stóran týdning fyri

viðurskifti Føroya við onnur lond, herundir møguligu samráðingarstøðu Føroya á uttanríkis- og fiskiveiðuøkinum. Skjalið snýr seg um viðurskiftini við onnur lond, umframt innanhýsis føroyskar fyrireikingar til møguligar samráðingar við onnur lond og viðger týðandi uttanríkispolitisk og- búskaparlig atlit hjá Føroyum í fleiri samanhangum.

Útflýggjan av skjalinum í síni heild verður tískil mett at kunna elva til týðandi skaða fyri uttanríkispolitisku áhugamál Føroya, heruppií samráðingarstøðu Føroya og viðurskiftini við onnur lond. Hóast ávísar upplýsingar í tilfarinum ikki einsamallar elva til skaða fyri uttanríkispolitisku áhugamál Føroya, metir Uttanríkis- og vinnumálaráðið, at tað í fleiri førum kortini er týðandi vandi fyri slíkum skaða, um upplýsingarnar verða tiknar úr tí samanhangi, tær eru brúktar. Í hesum sambandi verður víst á, at frávik kunnu gerast frá § 13, stk. 2, um lutvíst innlit avdúkar tey viðurskifti, sum tað er heimild at halda loyniligt. Eisini verður dentur lagdur á, at tað ikki er skylda at veita innlit í skjøl, har innihaldið ikki longur gevur meining ella hongur saman, um lutvíst innlit verður latið, sbr. Offentlighedskommissionens betænkning nr. 1510 (2009), s. 699.

Síðani Uttanríkis- og vinnumálaráðið fyri einari viku síðani noktaði at veita innlit í skjalið, hevur nógv umrøða verið av skjalinum og pørtum av innihaldinum, eins og politiska viðgerðin av málinum er komin longur. Í tí sambandi hava bæði landsstýrismaðurin í uttanríkismálum og løgmaður umrøtt veruligu umstøðurnar í málinum.

Tí verður nú mett, at tað ber til at lata lutvíst innlit í skjalið sambært § 13, stk. 2, uttan at lutvís útflýggjan av upplýsingum í skjalinum verður mett at elva til týðandi skaða fyri uttanríkispolitisku- og búskaparligu áhugamál Føroya, sbr. § 13, stk. 1, nr. 2.
Útstrikaðu brotini – brotini, sum ikki eru útflýggjað í hjálagda skjali – innihalda upplýsingar um samráðingarstøðu Føroya, umframt veruligar upplýsingar, sum eru grundarlag undir samráðingarstøðuni.
Útflýggjan av teimum upplýsingum, sum í hjálagda skjali eru útstrikaðar, hevði 1) verið til ógagns fyri føroysku samráðingarstøðuna í samráðingum við onnur lond og 2) elvt til nærliggjandi vanda fyri týðandi skaða fyri uttanríkispolitisku áhugamál Føroya.

Í sambandi við at partvíst innlit verður latið í frágreiðingina viðvíkjandi Russlandi, hevur Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið mælt til, at viðfesta frágreiðing verður send við, um innlit verður latið í talvuna við frágreiðandi teksti russiska veiðu og um- og uppskipingar í føroyskum havnum í 2021. Ein rætting er gjørd viðvíkjandi kongafiskatalinum, sum tey, ið hava fingið frágreiðingina útflýggjaða, eru blivin kunnað um á fundi. Mett verður tí, at hendan kunning eigur verða útflýggjað saman við innlitinum."

Seinni sama dag sendi Kringvarpið umboðsmanninum og Uttanríkis- og vinnumálaráðnum soljóðandi skriv:

"Kringvarpið hevur fyri løtu síðani móttikið fylgjandi innlit frá UVMR.

Uttan at taka støðu til innihaldið annars, skal eg beinanvegin átala handfaringina.

Útflýggjaða tilfarið er latið soleiðis, at móttakarin ongan møguleika hevur at seta tað í samanhang. Her eru eingi síðutøl, her er einki, ið gevur ábendingar um, hvar í frágreiðingini teksturin er tikin - hvat er við, og hvat er strikað út. Her er stutt sagt talan um "klipt & klistrað" tilfar, ið er útflýggjað.

At strika út er grundleggjandi partur av eini innlitsumbøn. Tí eigur slík handfaring sum henda ikki at koma fyri.

Fari tí at biðja um at fáa innlitið tilsent av nýggjum beinanvegin - og tað í slíkum vavi, at tað reelt kann brúkast til nakað."

Tann 19. juni 2023 sendi umboðsmaðin soljóðandi skriv til Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Umboðsmaðurin er kunnaður um nýggju viðgerðina av umbønini frá Kringvarpinum um alment innlit í frágreiðingina "í "Greiningararbeiðið hjá landsstýrinum um samband & samstarv við Russland", og at nú er partvíst innlit latið í frágreiðingina.

Umboðsmaðurin hevur eisini fingið kunning um mótmæli frá Kringvarpinum um, hvussu partvísa innlitið er latið, og at Kringvarpið hevur biðið ráðið um at fáa innlitið tilsent av nýggjum – "og tað, í slíkum vavi, at tað reelt kann brúkast til nakað."

Gingið verður út frá, at Ráðið sum skjótast viðgerð og svarar mótmælinum frá Kringvarpinum.

Við tað at hesi viðurskifti innganga í klaguviðgerðina hjá umboðsmanninum, verður Ráðið biðið um at senda okkum avrit av svari tykkara til Kringvarpið. "

Sama dag sendi Uttanríkis- og vinnumálaráðið Kringvarpinum soljóðandi skriv:

"Víst verður til teldupost tykkara, fríggjadagin 16. juni 2023.

Í § 13, stk. 2 í innlitslógini er ásett, at *"Um umstøður, sum nevndar í stk. 1 bert gera seg galdandi fyri ein part av einum skjali, skal viðkomandi gerast kunnigur við restina av innihaldinum í skjalinum."*

Við útflýggjaða tilfarinum er Kringvarpið gjørt kunnugt við tann partin av skjalinum, sum eftir eini ítøkiligari meting og serliga vísandi til nógvu umrøðuna av tilfarinum, ikki er fevnt av § 13, stk. 1, nr. 2. Við tað at innihaldsyvirlitið eisini er útflýggjað, síggjast bæði viðkomandi yvirskriftir og tilhoyrandi síðutøl, soleiðis at lesarin sær, hvar í skjalinum upplýsingarnar standa.

Vísandi til áður nevndu atlit handan § 13, stk. 1, nr. 2, kann skjalið ikki útflýggjast í síni heild.

Er okkurt ivamál, eru tit vælkomin at venda tykkum til Uttanríkis- og vinnumálaráðið "

Kringvarpið sendi seinni sama dag (19. juni) soljóðandi skriv til Løgtingsins umboðsmann og Uttanríkis- og vinnumálaráðið:

> "Eg vil bara endurtaka argumentatiónina í teldupostinum fríggjadagin.
>
> Avmarkaða innlitið, ið UVMR velir at lata okkum, er latið á slíkan hátt, at tað er ógjørligt at fyrihalda seg til tað.
>
> Hatta er at "klippa & klistra" og ikki at strika út trúnaðarupplýsingar.
>
> Tað hevur í mong ár verið siðvenja at strika út, um ein myndugleiki ikki vil lata innlit í alt tilfar. Leisturin hevur - sum longu greitt frá - sína orsøk. Og eg síggi einki argument fyri at UVMR nú brádliga kann broyta siðvenju.
>
> Eg fari tí enn einaferð at átala handfaringina og biðja um at fáa tilfarið sent umaftur."

Tann 21. juni 2023 spurdi umboðsmaðurin Uttanríkis- og vinnumálaráðið, um ráðið hevði ella var í ferð við at viðgera eitt svar til skrivið frá Kringvarpinum frá 19. juni.

Sama dag svaraði Uttanríkis- og vinnumálaráðið:

> "Víst verður til teldupost okkara mánadagin 19. juni, har svarað varð uppá viðmerkingarnar frá Kringvarpinum fríggjadagin 16. juni um innlitið í frágreiðingina um viðurskiftini við Russland.
>
> Viðmerkingarnar frá Kringvarpinum mánadagin 19. juni hava ikki givið orsøk til aðra niðurstøðu í málinum.
>
> Eru ivamál, er Kringvarpið framvegis vælkomið at venda sær til Uttanríkis- og vinnumálaráðið."

Tann 22. juni 2023 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at hann fór undir viðgerðina av málinum.

Seinni sama dag sendi Uttanríkis- og vinnumálaráðið soljóðandi skriv til Kringvarpið og umboðsmannin:

> "Víst verður til viðmerkingarnar frá Kringvarpi Føroya tann 21. juni. Uttanríkis- og vinnumálaráðið skal vísa á, at tað um ekstrahering stendur soleiðis í bókini Offentlighedsloven med kommentarer (2014), Mohammad Ahsan, síða 478 f.
>
> *"Ekstraheringen foregår i øvrigt ved, at de oplysninger, der skal meddeles, skrives over på et andet dokument, der herefter udleveres* [okkara undirstriking], *eller ved, at de oplysninger, der i det pågældende dokument kan undtages, lakkes ud eller på anden måde dækkes over,*

*således at det alene er de ekstraheringspligtige oplysninger, der fremgår af det udleverede dokument."*

Í einum úttalilsi frá Fólkatingins Umboðsmanni frá 20. november 2015 (málsnummar 15/04141), metti umboðsmaðurin ikki, at tað var grundarlag fyri at finnast at, at danska verjumálaráðið hevði latið innlit í umbidnu upplýsingarnar við at savna ekstraheraðu upplýsingarnar í einum skjali, sum varð gjørt til endamálið. Málið varð viðgjørt eftir nýggju donsku innlitslógini, men Fólkatingsins Umboðsmaður legði aftrat, at:

*"Retstilstanden er på dette punkt uændret sammenlignet med den tidligere offentlighedslov. Se herved betænkning nr. 1510/2009 om offentlighedsloven, s. 555."*

Víst verður annars til viðmerkingar okkara frá 19. juni"

Seinni sama dag sendi Kringvarpið umboðsmanninum og Uttanríkis- og vinnumálaráðnum soljóðandi skriv:

"Eg skal bara minna á, at tað í hesum døgum eru 30 ár síðani at løgtingslóg um alment innlit varð samtykt og lýst at koma í gildi 1.januar 1994. Lógin er tann sama ídag, tó við einstakari broyting í 2001.

Tað er tí undranarvert, at eitt aðalráð nú - 30 ár seinni - av sínum eintingum og púra ómotivera fer undir at praktisera nýggja mannagongd, vísandi til Danmarkar, har tey hava sína egnu innlitslóg."

## 4. Niðurstøða

Hetta mál snýr seg um sýtan av innliti í skjalið, nevnt "Frágreiðing um viðurskiftini við Rusland", sum er eitt greiningararbeiði, sum Fiskimálaráðið og Uttanríkis- og vinnumálararáðið hava latið gjørt sum grundarlag undir viðgerð og støðutakan hjá landsstýrinum um viðurskiftini við Russland.

Vísandi til § 13 stk. 1, nr. 2 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina), metti Uttanríkis- og vinnumálaráðið upprunaliga, at útflýggjan av skjalinum í síni heild kundi elva til týðandi skaða fyri uttanríkispolitisku áhugamál Føroya, heruppií samráðingarstøðu Føroya og viðurskiftini við onnur lond. Víst varð eisini til § 13, stk. 1 nr. 6 og atlit til politisku avgerðartilgongdina í sambandi við eitt lógarmál. Eisini hevði ráðið mett um møguleikan fyri at lata meirinnlit sambært reglunum í § 4, stk. 1, 2. pkt. og var komið til, at atlitini, sum lógu til grund fyri at undantaka upplýsingarnar frá innliti í hesum føri, tala ímóti at geva meirinnlit eftir reglunum í § 4 stk.1, 2. pkt.

Undir klagumálsviðgerðini hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið játtað partvíst innlit í frágreiðingina.

Viðgerð mín av hesari klagu snýr seg um, hvørt tað av fyrstan tíð var heimild fyri at sýta innlit í alla frágreiðingina og hvørt Uttanríkis- og vinnumálaráðið í sambandi við tað seinni partvíst játtaða innlitið, hevur tikið ov nógvar upplýsingar úr frágreiðingini, og um innlitið var latið á nøktandi hátt.

**Noktan av innliti sambært § 13, stk. 1, nr. 2 og 6 í innlitslógini**
§ 13, stk. 1, nr. 2 og nr. 6 í innlitslógini er soljóðandi:

> ”**§ 13.** Rætturin til skjalainnlit kann avmarkast í tann mun tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni viðvíkjandi
> ...
> 2) uttanríkispolitiskum ella uttanríkisfíggjarligum áhugamálum, herundir viðurskiftini við aðrar tjóðir ella millumtjóða stovnar,
> ...
> 6) privatum ella almennum áhugamálum, har tað vegna serligar umstøður í hesum føri er neyðugt at dylja málið.”

Sambært upplýsingunum frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum er frágreiðingin ein samanrenning av metingum og upplýsingum á uttanríkis- og fiskiveiðuøkinum, sum hava stóran týdning fyri viðurskifti Føroya við onnur lond, herundir møguligu samráðingarstøðu Føroya á uttanríkis- og fiskiveiðuøkinum.

Í sambandi við noktandi innlitið tann 7. juni 2023, metti ráðið, at útflýggjan av skjalinum kundi elva til skaða fyri uttanríkispolitisku áhugamál Føroya, heruppí samráðingarstøðu Føroya og viðurskiftini við onnur lond. Eisini varð víst á atlitini til politisku avgerðartilgongdina, tí málið (lógarmálið) framvegis var undir viðger í Løgtingsins uttanlandsnevnd, sum hevði fingið frágreiðingina í trúnaði.

Eg havi lisið frágreiðingina og eri samd við Uttanríkis- og vinnumálaráðið í, at stórur partur av frágreiðingini kemur undir ásetingina í § 13 stk.1, nr. 2, og at rætturin til skjalainnlit tí kundi avmarkast.

Eg haldi tó, at partar av frágreiðingini eru ein lýsing av so mikið alment atkomuligum viðurskiftum, at tað ikki bert við heimild í § 13 stk. 1, nr. 2 var grundarlag fyri at dylja alla frágreiðingina.

Hinvegin haldi eg eins og ráðið, at tað kundi verið órógvandi fyri politisku avgerðartilgongdina at latið innlit í hesar partar av frágreiðingini, áðrenn uttanlandsnevndin hevði havt møguleika at kunna seg um frágreiðingina og viðgjørt lógarbroytingina. Eg haldi tí, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið samanlagt við heimild í § 13, stk. 1, nr. 2 og nr. 6 hevði eina tíðaravmarkaða heimild at nokta innlit í alla frágreiðingina.

Eg havi ikki viðmerkingar til metingina hjá ráðnum um ikki at lata innlit eftir reglunum í § 4 stk. 1, 2. pkt. um meirinnlit.

**Viðvíkjandi partvísa innlitinum**

*Vavið av innlitinum*

§ 13 stk. 2 í innlitslógini er soljóðandi:

> "*Stk. 2.* Um umstøður, sum nevndar í stk. 1 bert gera seg galdandi fyri ein part av einum skjali, skal viðkomandi gerast kunnigur við restina av innihaldinum í skjalinum."

Tá innlit verður givið, eigur fyrisitingin at hava í huga, at endamálið við almennum innliti er at tryggja gjøgnumskygni í fyrisitingini, soleiðis at borgarar og miðlar í mest møguligan mun kunnu fylgja við og hava eftirlit við, at alt fer rætt fram, tá fyrisitingin útinnir arbeiði sítt. Tað hevur tí eisini týdning, at innlit verður givið á slíkan hátt, at tað fremur so gott gjøgnumskygni sum gjørligt. Í viðgerðini skal tí altíð havast í huga, at meginreglan er fult innlit í øll skjøl og upplýsingar, og at tað krevst ein heimild fyri at sýta ella avmarka innlit.

Í sambandi við at partvíst innlit varð játtað tann 16. juni 2023, hevur Uttanríkis- og vinnumálráðið víst á, at síðan ráðið noktaði at veita innlit í skjalið, hevur nógv umrøða verið av skjalinum og pørtum av innihaldinum, eins og politiska viðgerðin av málinum er komin longur, og eisini hava bæði landsstýrismaðurin í uttanríkismálum og løgmaður umrøtt veruligu umstøðurnar í málinum. Ráðið hevur tí nú mett, at tað ber til at lata lutvíst innlit í skjalið sambært § 13, stk.1, nr. 2 uttan, at lutvís útflýggjan av upplýsingum í skjalinum verður mett at elva til týðandi skaða fyri uttanríkispolitisku- og búskaparligu áhugamál Føroya.

Ráðið hevur greitt frá, at brotini, sum innlit ikki var givið í, innihalda upplýsingar um samráðingarstøðu Føroya, umframt veruligar upplýsingar, sum eru grundarlag undir samráðingarstøðuni.

Sambært ráðnum hevði ein útflýggjan av teimum upplýsingum, sum í skjalinum eru útstrikaðar ella tiknar úr verið til ógagns fyri føroysku samráðingarstøðuna í samráðingum við onnur lond og elvt til nærliggjandi vanda fyri týðandi skaða fyri uttanríkispolitisku áhugamál Føroya.

Undir viðgerðini hevur Kringvarp Føroya mótmælt háttinum, ið nýttur var at geva partvíst innlit.

Eg havi lisið frágreiðingina og sæð tey brot, sum Kringvarp Føroya hevur fingið innlit í. Eftir mínari meting er innlit sýtt í óneyðuga nógv brot í frágreiðingini.

Eg haldi, at fleiri brot í frágreiðingini (s. 3 – 9) innihalda upplýsingar um faktuell viðurskifti og alment atkomuligar upplýsingar. Eg haldi sostatt, at í nøkrum brotum er ikki talan um upplýsingar, sum - nú atlitið til politisku avgerðartilgongdina ikki er aktuelt longur – mugu undantakast frá innliti vegna verju av uttanríkispolitiskum ella uttanríkisfíggjarligum áhugamálum.

*Hátturin, at geva innlit (ekstraheringshátturin),*
Viðvíkjandi háttinum, hvussu partvísa innlitið er givið, havi eg hesar viðmerkingar:

Innlitslógin § 13, stk. 2 er soljóðandi :

> *"Stk. 2.* Um umstøður, sum nevndar í stk. 1 bert gera seg galdandi fyri ein part av einum skjali, skal viðkomandi gerast kunnigur við restina av innihaldinum í skjalinum."

Tað er ikki nøkur lógaráseting um, hvussu partvísa innlitið skal gevast. Ei heldur meti eg meg hava grundarlag at siga, at tað finst ein bindandi siðvenja um, at partvíst innlit verður latið við at strika yvir tekst í upprunaskjalinum.

Føroyska vegleiðingin til innlitslógina sigur soleiðis um at lata partvíst innlit: "Kemur bert ein partur av einum skjali undir undantaksreglurnar í §§ 12-13, skal hann, ið hevur biðið um skjalainnlit, verða gjørdur kunnigur við restina av skjalinum, sbrt. § 12, stk. 2, og § 13, stk. 2."

Í løgfrøðiliga lesnaðinum verður víst á, at tað eru tveir háttir at lata partvíst innlit. t.e.:

- við at strika yvir upplýsingar, sum innlit ikki verður latið í, ella
- við bert at vísa tey brot av tekstinum, sum innlit verður latið í, og taka restina av tekstinum burtur.

Við støði í hesum er tað mín fatan, at myndugleikin kann velja, á hvønn hátt hann letur partvísa innlitið. Innlitshátturin skal tó í sjálvum sær ikki gerast ein forðing fyri innlitinum.

Í hesum føri hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið nýtt báðar teir nevndu háttirnar.

Í innihaldsyvirlitinum er strikað yvir tey punkt og kapitlar, sum innlit ikki er givið í, meðan innlit er givið í sjálvan tekstin í frágreiðingini við at taka burtur tann partin av tekstinum, sum ikki skal síggjast. Harvið er tað bert teksturin, sum innlit verður givið í, sum sæst á skjalinum. Frágreiðingin, sum upprunaliga var 40 síður, gjørdist harvið eitt nýtt skjal við 15 síðum.

Kringvarp Føroya hevur mótmælt hesum hátti at geva partvíst innlit, tí sambært teimum er hetta ein forðing fyri at fáa sum best burturúr innlitinum.

Eg havi gjøgnumgingið skjalið við partvísum innliti og upprunaskjalið. Eg haldi tað í hesum máli skapar ógreidleika, at ráðið í sama skjali hevur nýtt báðar háttirnar at ekstrahera, heldur enn at halda seg til tann eina. Eg undrist í hesum sambandi á, at ráðið ikki vil nýta tann háttin at ekstrahera, sum Kringvarpið ynskir.

Viðvíkjandi partvísa innlitinum havi eg staðfest, at í fleiri støðum er uppsetingin av upprunatekstinum broytt, tá teksturin er drigin út – t.e. reglubrot eru fallin út, og yvirskriftir og

undiryvirskriftir síggjast ikki sum yvirskriftir. Eisini havi eg staðfest, at samsvar er ikki millum, hvat innlit er givið í í innihaldsyvirlitinum, og hvør tekstur er tikin úr frágreiðingini.

Vísandi til at eg haldi, at ov nógv brot eru tikin úr frágreiðingini, og at partvísa innlitið ikki er givið á nóg greiðan hátt, fari eg at heita á Uttanríkis- og vinnumálaráðið um taka málið upp til nýggja viðgerð og lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.

Hanna Vang

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður